# Hugleiðingar, nú barnagarðurin á Skúlanum á Trøðni er niðurlagdur

NIELS MIDJORD

Tað hevur verið hugstoytt og tyngjandi at sæð barnagarðin á Sernámsdeplinum rigga av. Hesin barnagarður og starvsfólkini har hava í nærum hálva øld gjørt eitt slóbrótandi arbeiði innan sítt øki. Úr øllum landinum eru børn við menningartarni komin hagartil eygleiðingar, og út frá hesum eygleiðingum hevur starvsfólkið síðan lagt foreldrunum og stovnum, haðan børnini eru komin, lag á, hvussu teirra barn best kundi mennast; og tey børnini, sum komu til eygleiðingar, og sum ikki vóru hildin at vera egnað at ganga í vanligum barnagarði, hevur barnagarðurin á Sernámsdeplinum so sjálvur tikið sær av. Eisini hevði barnagarðurin uppbygt eitt leikasavn við mennandi tilfari, sum børnini, íð komu til eygleiðingar, kundu læna heim við sær. Nú er barnagarðurin og leikasavnið so niðurløgd, meðan eygleiðingin og ráðgevingin enn virka í skerdum líki.

Men onkustaðni skulu børnini, sum barnagarðurin var ætlaður til, vera. So nú hevur Almannamálastýrið tikið um endan, har Mentamálastýrið slepti og leigað seg inn í lonina, hjá barnagarðinum. Sum skilst, er tó ikki ætlanin, at ein nýggjur barnagarður skal setast á stovn, men heldur at hetta skal verða eitt stað, har stuðlarnir hjá hesum børnum kunnu halda til saman við børnunum.

Ein kann undrast á, hvussu tað ber til,at sovorðið kann henda. Serstakliga í hesum døgum, nú so nógv verður tosað um visiónir. Ein grundin man vera, at tá íð Skúlin á Trøðni varð yvirtikin, var pædegogiska rákið, *at skúli og barnagarður skuldi vera fyri øll. At øll børn skuldu fáa møgulleika og umstøður til at vaksa upp í nærumhvørvinum, uttan mun til hvussu tey vóru fyri.* Tí varð hildið, at tað ikki longur var brúk fyri einum serskúla, sum Skúlanum á Trøðni og at hann tí átti at verða niðurlagdur við náttúrligari frágongd. Ein fylgjan av hesi ætlan er tað, sum vit nú hava verið vitni til viðvíkjandi serbarnagarðinum: Tá íð tvær av pionerunum og kapasitetunum á stovninum fyri góðum ári síðan løgdu frá sær vegna aldur, var starvsfólkatalið komið so langt niður, at ikki bar til at halda áfram. Eftirverandi starvsfólkini vóru tí sett í onnur størv á Skúlanum á Trøðni, og serbarnagarðurin varð niðurlagdur.

Vit eiga at stremba eftir, at so nógv børn, sum møguligt, finna seg til rættis og trívast í vanligu skúlunum og kommunalu ansinginí, men í teimum førum, har hetta ikki eydnast, er tað ikki rætt at tvíhalda um, at hetta er tann besta loysnin. Um ein næmingur við serligum tørvi skal ganga í vanligum flokki, krevur tað ofta, at hann fær ein lærara knýttan at sær burturav. Við tí játtan, sum nú er á fíggjarlógini til serligan tørv, ber hetta í flestu førum ikki til, men sjálvt um hetta eydnast, verður tað í longdini trupult at fáa næmingin at trívast, tí hann hevur ongan at samskifta við á jøvnum føti. Um serflokkar skulu knýtast til ymisku skúlarnar og stovnarnar kring landið, verður næmingatalið í hvørjari kommunu sær ov lítið til, at næmingarnir við serligum tørvi kunnu flokkast í samvirkandi eindir, og av tí at næmingarnir tískil vera so ymiskir til, verður trupult at fáa teir at trívast saman, og hjá læraranum verður trupult at uppbyggja ein førleika, soleiðis at hann á besta hátt kann taka sær av hvørjum næmingi sær.

Frá polittiskari síðu hevur verið miðjað ímóti, at flyta alt viðvíkjandi barnaansing og skúla út á kommunurnar, fyri at avgerðirnar skulu liggja so tætt at nærumhvørvinum,sum gjørligt. Hetta hevur eisini verið gjørt niðri, men í samanburði við Danmark eru allar Føroyar at rokna sum ein lítil kommuna, og um so allir næmingarnir, sum ikki passa inn í almennu undirvísingar- og ansingarskipanina vóru fluttir í ein skúla, høvdu teir vónandi ikki verið fleiri enn so, at talan hevði verið um tað, sum danir nevna „en lilleskole“ við teimum trivnaðarmøguleikum, sum tað inniber.

Við útbyggingini av samferðslukervinum er nærumhvørvið hjá flestu børnunum í landinum eisini vaksið munandi, og tað veksur alsamt. Eftir at Skúlin á Trøðni var settur á stovn, var næmingaheim fingið til vega til næmingar skúlans, sum komu av bygd. Í dag búgva flestu næmingarnir heima og koyra við bygdaleiðum millum heim og skúla. Teir sum nú búgva á næmingaheiminum, gera tað av øðrun orsøkum enn av fjarstøðuni millum heim og skúla. Helst av teirri grund, at teir her hava betri møgulleika til at luttaka í ungdómsog frítíðarvirksemi saman við javnlíkum. T. d. búgva fleiri av teimum, sum luttóku á paraolympisku ítróttarstevnuni í Rom í heyst -og tað við góðum úrsliti-, á næmingaheimi skúlans.

Alt hetta bendur á, at serundirvísingin í Føroyum og støðan hjá Skúlanum á Trøðni í hesum sambandi eiga at verða tikin upp til nýggja umhugsan.

Samstundis sum Skúlin á Trøðni hevur verið niðurtrappaður, eru ymiskir trupulleikar hjá børnum við serligum tørvi komnir í ljósmála, og tað skal sigast almannaverkinum til rós at tey hava verið skjót at lofta hesum trupulleikum og gjørt atgerðir, at bøta um teir. Men trupult er at brót upp úr nýggjum, og tað er ikki altíð, at atgerðirnar hava virkað eftir ætlan, men ikki eru tær vornar bíligari fyri tað. So mikið størri spell er tað har tað ikki var neyðugt at bróta upp úr nýggjum, tí at Skúlin á Trøðni hevur arbeitt við somu trupulleikum í mong ár. Ivaleyst hevði hann eisini kunna gjørt tað betri, um hann var styrktur við fleiri serútbúnum fólki á ymiskum starvsøkjum, betri møguleikum hjá starvsfólkunum til víðari útbúgving og betri normering fyri atferðartruplar næmingar. Hetta hevði sjálvsagt kostað, men lítið aftur ímótið kostnaðinum av einum nýggjum stovni.

Haldi kortini, at Almannamálaráðið hevur víst í verki, at teirra hjarta brennur heitari fyri teimum menningartarnaðu og teirra avvarandi enn hjørtuni í Mentamálastýrinum gera, og tí haldi eg at Almannaverkið ikki bara átti at yvirtikið lonina hjá barnagarðinum, men heldur at tikið allan Skúlan á Trøðni, sum hann er, undir sínar veingir. Meirilutin av næmingunum á Skúlanum á Trøðni er longu knýttur til almannaverkið so elle so, og verður tað helst alt lívið. Um skúlin lá undir Almannamálaráðnum hevði tað tí verið lættari at skapa eina heild yvir dagin hjá hesum næmingunum. Eisini slapst undan teimum gráu økjunum, har ábyrgdin hjá Mentamálastýrinum og Almannamálastýurinum falla saman, og har tað tískil er trupult at flyta nakað.

*Framhald av síðu 11*

skipa fyri nøktandi heildartilboðum til næmingar og foreldur, har barnaansing, fólkaskúli, musikkskúli, frítíðarskúli v.m. eru samskipaði yvir ymsar tíðir á degnum.

Kommunurnar eru eisini nógv betri fyri at fremja neyðugar raðfestingar í sambandi við ítøkiliga undirvísingarvirksemið í skúlanum.

Hesar raðfestingar byggja á staðbundnan tørv ella ítøkilig ynski um at veita eitt betri tilboð enn minstukrøvini – eitt nú til at seta serráðgevarar í starv til lesi-og skriviveikar næmingar, at gera serstøk átøk at betra um lesiførleikan sum heild, at áseta eykatímar til náttúrufak á ávísum flokssstigum, at gera ávísar royndarskipanir til næmingar, ið ikki fáa nóg nógvar avbjóðingar v.m.

Hetta merkir, at kommunurnar eru virknir aktørar í at menna skúlan á staðnum, hvat ein miðfyrisiting als ikki hevur møguleika til.

**Kommunubygnaðurin og fíggingin**

Tá tingfólk umrøða útleggjing av fólkaskúlanum og øðrum uppgávuøkjum við, so eru tað tvey viðurskifti, ið tey ofta taka fram fyri at seta forðingar í vegin fyri hesi gongd.

Tað eina er kommunubygnaðurin – at tað ber ikki til at leggja skúlan út til smáu kommunurnar. Føroyar mugu fyrst skipast í færri kommunur, er undanførslan.

KSF hevur altíð virkað fyri færri og burðardyggum kommunueindum, men tað er í sjálvum sær ikki neyðugt at bíða eftir hesum. KSF kann liva við, at fólkaskúlin verður lagdur út til kommunal samstarvsøki. Henda skipan verður longu brúkt á øðrum lógarbundnum uppgávuøkjum, so tað er ikki nakar meinbogi fyri vælvirkandi kommunalum bygnaði undir fólkaskúlanum.

Tað næsta er fíggingin, har tað javnan verður hildið uppá, at neyðugt er við javningarskipan millum kommunurnar. At kommunurnar eru so ójavnar í inntøkugrundarlagi og útreiðslutørvi, at hetta fer at ávirka umsitingarligu uppgávuna so mikið, at tænastustøðið verður ymiskt úti í ymsu kommununum.

KSF metir, at hetta er ikki í samsvari við veruleikan. Fyri tað fyrsta, so skal peningur fylgja við útlagdu uppgávuni skilt á tann hátt, at kommunuskatturin skal hækka við tí, sum skúlin kostar at reka, og landsskatturin lækka samsvarandi. Er henda fortreyt til staðar, so er ikki nakar serstakur tørvur á javningarskipan í sambandi við kommunala rakstsurin av fólkaskúlanum.

Fyri tað næsta er vavið av javningini altíð sera lítið í mun til samlaðu kommunalu fíggingina – eini 3 %. Henda sera avmarkaða upphædd er tí ikki tað, sum fer at gera av, um ein kommuna megnar at røkja sína uppgávu viðvíkjandi fólkaskúlanum ella ei.

**Nú skal tað verða**

KSF fer við stórum áhuga at fylgja við í aðalorðaskiftinum týsdagin. Hetta kanska verður eitt søguligt orðaskifti, tí nógv stór tøk skulu takast, um so er, at vit skulu fáa tann góða fólkaskúlan, vit øll ynskja.

KSF er ikki í iva um, at rætta politiska avgerðin er at leggja umsitingina av skúlanum til kommunurnar – ongantíð ov skjótt og helst ikki seinni enn í 2008.

KSF fegnast tí um, at landsstýrismaðurin vil hava kommunurnar at umsita skúlan, og tað skal hann hava rós fyri. Men hann eigur bert rósið uppiborið, um so er, at kommunurnar fáa veruliga ávirkan og fulla ábyrgd av virksemi skúlans.

KSF fegnast eisini um, at Føroya Lærarafelag í PISA-álitinum tekur undir við hesum.

Allir partar eru tí samdir. Tað er nú upp til løgtingið at taka lógvatak saman við okkum øðrum.

Nú skal tað verða!

## Hví júst hesi staðarnøvn

Sunda Bókasavn á Oyrarbakka skipar í komandi viku fyri áhugaverdum tiltaki í Skálanum í Norðskála-Oyrar skúla. Mikukvøldið 7. februar fer málfrøðingurin Eivind Weyhe at greiða frá um staðarnøvn og teirra uppruna - hví eitur tað júst soleiðis, sum tað eitur? Fyrilesturin er um staðarnøvn og tann týdning, sum hesi hava, fyri at fáa kunnleika um upprunaligu búsetingarnar. Í staðarnøvnunum liggur eitt stórt ríkidømi, sum eigur at verða varðveitt, bæði við innsavningararbeiði og við at tey liva sítt fríska lív í gerandisdegnum. Navnið gevur landslagnum ein samleika, sum er virðismikil fyri okkum. Møguleiki verður at koma við spurningum um staðarnøvn her um leiðir. Kanska fæst svar uppá ymiskt, sum fyrr hevur verið ósvarað.

## Hagstovan fær enska heimasíðu

Nú letur Hagstova Føroya upp fyri ensku útgávuni av heimasíðu stovnsins. Av Hagstovuni verður sagt, at hetta verður gjørt, fyri at nøkta eftirspurningin á hagtølum, bæði frá útlendingum og frá føroyingar, sum vilja vísa útlendingum hagtøl um føroysk viðurskifti. Hagstovan sigur, at enska útgávan ikki er beinleiðis umseting av føroysku útgávuni, men er skipað eftir tí tørvi, sum tey meta at útlendingar munnu hava.

- Vit hava lagt dentin á heildarmyndina av føroyska samfelagnum, heldur enn at fara í smálutir, sigur Hagstovan.

Allur hagtalsgrunnurin er á enskum, og tí ber nú til at vísa útlendingum á besta miðið við hagtølum um Føroyar. Enska síðan er at finna á www.statistics.fo